# Fiskimálaráðið

Dagfesting: 14-10-2022

**Uppskot til**

**Kunngerð um broyting í kunngerð um loyvi til royndarfiskiskap**
(Treytin um veiðiloyvi ella fiskiloyvi er slept og nágreining av frágreiðingini)

**§ 1**

Í kunngerð nr. 8 frá 11. februar 2020 um loyvi til royndarfiskiskap, sum broytt við kunngerð nr. 123 frá 23. juli 2020, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** § 4 verður orðað soleiðis:

"**§ 4.** Royndarfiskiskapur kann bert fara fram við fiskifari undir føroyskum flaggi, sum hevur fingið serstakt fiskiloyvi til royndarfiskiskap, sbrt. § 50, stk. 1 í løgtingslógini.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann í serligum førum geva undantak frá kravinum um føroyskt skrásett fiskifar til royndarfiskiskap, um eitt nú fiskifør ella serlig tøkni ikki er tøk í føroyska fiskiflotanum, sbrt. § 50, stk. 2 í løgtingslógini."

**2.** Í § 7, stk. 1, 2. pkt. verður "sbrt. § 50, stk. 1, 2. pkt." broytt til: "sbrt. § 50, stk. 3, 2. pkt."

**3.** § 9 verður orðað soleiðis:

"**§ 9.** Í sambandi við, at serstaka fiskiloyvið til royndarfiskiskap kann verða endurnýggjað á hvørjum ári í upp til fimm ár, skal teldutøk frágreiðing um royndarfiskiskapin latast Fiskimálaráðnum. Frágreiðingin skal innihalda gongd og niðurstøður frá royndarfiskiskapinum, umframt avrit av nágreiniligu dagbókini sbrt. § 8, stk. 1, nr. 2.
*Stk. 2.* Frágreiðing um royndarfiskiskapin í einum álmanakkaári skal latast inn í seinasta lagi 1. februar árið eftir.
*Stk. 3.* Frágreiðingin er partur av metingini um endurnýggjan av loyvinum sambært hesi kunngerð."

**§ 2**

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Fiskimálaráðið, dagfesting

**Árni Skaale**
landsstýrismaður

/ Rógvi Reinert